# Suðuroyartunnilin kann taka føroyska byggivinnu av fótum

*Verður Suðuroyartunnilin bygdur á sama hátt, sum hinir undirsjóvartunlarnir, er sannlíkt at føroysk byggivinna verður skorin í helvt. Við tí úrsliti at føroysk byggivitan, nú og í framtíðini, í stóran mun verður flutt í onnur lond.*

Forkanningin hjá Landsverki av einari nýggjari suðuroyarleið staðfestir, at einans 10% av kostnaðinum fyri verkætlanina kann fíggjast við brúkaragjaldi. Tað merkir, at í 30 ár skal landskassin rinda 185 mió krónur um árið til ein nýggjan Suðuroyartunnil. Roknifortreytirnar síggjast her:

**Talva 1: Roknifortreytir í mió.kr**

| | |
|---|---|
| Íløgukostnaður | 5.382 |
| Partapeningur | 1.200 |
| Fíggjartørvur | 4.182 |
| Renta | 2,73% |
| Áramál | 30 |
| **Árligt lánsgjald** | **206** |
| | |
| Brúkaragjald, 10% | 21 |
| Írestandi, 90% | 185 |

Kelda: Landsverk

## Íløgan bindur helvtina av íløgukarminum komandi nógvu árini

Búskaparráðið hevur víst á, at verður Suðuroyartunnilin framdur sum ætlað, so kemur verkætlanin at brúka íløgukarmin komandi nógvu árini. Verður hugt at íløgukarminum hjá landinum seinastu 5 árini sæst, at bara Suðuroyartunnilin fer at brúka millum 40 og 50% av íløgukarminum komandi tíðina.

Grafur 1: Søguligi íløgukarmurin í mun til Suðuroyartunnilin, 2021 prísir*

Kelda: Fíggjarmálaráðið
*formil: FV=PV*(1+2%)^t

## Føroysk tunnils- og byggivinna við sviðusoð

Undirsjóvartunlarnir í Føroyum eru uttan undantak framdir av útlendskum fyritøkum, hóast føroyskar byggifyritøkur í ávísan mun hava verið undirveitarar. Tað hevur havt við sær, at vitan, førleikar og avlop í ov stóran mun er flutt beinleiðis av landinum.

Tá Suðuroyartunnilin leggur seg á slaka helvt av íløgukarminum komandi nógvu árini, so er eyðsæð at minni verður til føroyska byggivinnu at byggja fyri og kappast um. Tað er til ampa fyri byggivinnuna, sum má laga seg til munandi minni eftirspurning, men eisini til ampa fyri føroyska samfelagið, tí tá byggivinnan tódnar, hvørva vitanarstørv, royndir og førleikar. Harumframt, so gerst føroyska samfelagið minni áhugavert hjá komandi ættarliðum innan byggivinnu og tunnilsgerð.

Almennar íløgur eru ein týðandi partur av grundarlagnum undir føroyskari byggivinnu. Seinastu árini hevur byggivinnan staðið fyri umleið 6-7% av BTÚ og umleið 15% av føroysku arbeiðsfjøldini starvast í dag í byggivinnuni. Vit hava í dag bygt upp eina sterka byggivinnu við sterkum aktørum innan allar geirar. Verður helvtin av fíggjarliga grundarlagnum tikið burtur, vil tað hava stórar avleiðingar við sær. Fyri byggivinnuna, fyri arbeiðsfjøldina, fyri føroyska búskapin og evnini at draga komandi ættarlið til Føroya at virka og liva.

## Ein gyltur møguleiki at skapa førleikamenning

Talan er um størstu føroysku íløguna nakrantíð, har staðbundin vitan er mett at vera ein avgerðandi fortreyt um Suðuroyartunnilin skal eydnast. Bróðurparturin av pengum, royndum og vitan má ikki enn einaferð flytast av landinum.

Um tað verður gjørt, so vraka vit okkum sjálvi og teir menningarmøguleikar ein slík verkætlan hevur, tí vit læra lítið, tá onnur gera arbeiðið fyri okkum. Byggiverkætlanir og førleikamenning ganga hond í hond, og tí vil Suðuroyartunnilin geva føroysku byggivinnuni nakað at arbeiða við og fram ímóti. Umframt at menna stovnar og vinnuna, so kann ein verkætlan av hesi støðd væntandi eisini skapa langtíðar fólkavøkstur, tá fólk við førleikum kunnu finna spennandi og mennandi arbeiðsuppgávur í Føroyum.

Í grannalondum okkara verða slíkar verkætlanir júst brúktar til at seta ynski og treytir fyri at fáa staðbundna vitan og royndir í spæl. Eitt nú hevur sambandið um Femern frá byrjan verið brúkt til førleikamenning innan donsku byggivinnuna, har eitt nú ein nýggjur vitanardepil var settur á stovn, sum skuldi tryggja at Femern verkætlanin í breiðan mun kom byggivinnuni, granskingini og vinnulívinum til góðar[1]. Tiltakið má sigast at hava eydnast, tí umframt danskar stovnar og fróðskaparsetur, so eru meiri enn 100 danskar fyritøkur knýttar at verkætlanini[2].

## Vit mugu tora at hugsa longri enn Suðuroyartunnilin

60 ára royndir við tunlum millum bygdir og slóðbrótandi undirsjóvartunlum millum oyggjar hava flutt føroyska samfelagið fram í oddin innan vælferð, flytføri og kappingarføri. Føroyar eru í heimshøpi eitt av teimum samfeløgum onnur venda sær til fyri at fáa íblástur og vitan um týdningin av tunlum í samfelagsmenningini. Landsverk hevur verið høvuðsrøðari á World Tunnel Congress 2022 og Fjeldsprengningskonferencen 2022, umframt at ráðharrar og sendifólk úr Englandi, Skotlandi, Írlandi, Hetlandi og Týsklandi hava verið á vitjan og/ella leitað sær vitan. Tað er eyðsæð, at tað er eftirspurningur eftir føroyskari tunnilsserfrøði.

Tunnilsbólkurin vil vísa á, at íløgan í Suðuroyartunnilin er meira enn ein einstøk verkætlan. Talan er um stórar menningarmøguleikar innan eina føroyska vinnu, sum longu nú er eftirspurd uttanlands, ið ikki mugu gleppa okkum av hendi.

Vinarliga vegna tunnilsáhugabólkin

**Sigurd L. Lamhauge, formaður**

---

1https://www.licitationen.dk/article/view/865061/femernerfaringer_skal_bredt_i_spil_minister_klipper_snor_til_nyt_videnscenter
2 https://www.femern.info/da/news/virksomheder-kan-stadig-komme-i-spil-som-underleverandoer-til-femern-projektet

*Stovnar og fyritøkur, sum virka innan føroyskt tunnilsarbeiði, hava savnað seg í áhugafelagið Faroese Tunnel Society, ið skal savna vitanina og slóða veg fyri føroyskari tunnilsserfrøði í Føroyum og uttanlands. Felagið vil gera vart við seg, nú Suðuroyartunnilin nærkast.*

## FAROESE TUNNELLING SOCIETY

tunnelling.fo | info@tunnelling.fo

### MEMBERS & PARTNES

LANDSVERK · FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA University of the Faroe Islands · ARTICON · LBF · SEV

EL-SERVICE · KJ · J&K PETERSEN · pb CONSULT · JARÐFEINGI

SMJ · KS Teknik · BORG · SPENN Sp/f · KAJ ANDREASEN & CO